# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Vinnuglottar í Kollafirði og Klaksvík

Tað var hugaligt at hoyra tíðindini í Rás2 í gjár, har sagt varð frá, at ætlanir eru at lata upp aftur stóra pelagiska virkið í Kollafirði. Hetta virkið, sum varð ætlað at gerast nýggja flaggskipið í fiskiídnaðinum í Føroyum, kom ongantíð rættiliga fyri seg. Hálendsk áhugamál stóðu aftanfyri og varð endamálið at skipa fyri eini framleiðslu- og frystimiðstøð fyri tey mongu pelagisku fiskasløgini, sum finnast her um okkara leiðir í Norðuratlantshavi. Hetta virkið skuldi so skapa arbeiðspláss og meirivirði til Føroyar.

Hitt virkið, sum í mong ár hevur tikið ímóti pelagiskum fiski, Havsbrún í Fuglafirði er ein av juvelunum í okkara vinnulívi. Hóast nógvur fiskur er farin til djóraføði heldur enn til mannaføði, so hevur virkið havt alstóran týdning fyri føroyska búskapin og her ikki minst sum leverandørur til alivinnuna.

Tað hevur tó og er framvegis eitt ynski at troyta pelagiskum fiskasløgini til matna, tí meira virði tá fæst burtur úr fiskatilfeinginum, eisini tí mett verður, at slík framleiðsla er meira burðardygg. Vit skulu brúka færri tons til at fáa sama samfelagsliga virði burtur úr, tá fiskurin fer til matna heldur enn til djóraføði.

Vit hava so eisini sæð, at nógv av pelagisku fiskasløgunum sum lodna, sild, makrelur og svartkjaftur eru avreidd til matvøruvirki í grannalondunum. Harvið hevur føroyska samfelagið mist stór virði, tó at flotin hevur fingið meira burtur úr. Tí varð tað sera kærkomið, tá stóra og nútímans virkið í Kollafirði læt upp nøkur ár herfyri. Tað skuldi nøkta ein tørv og tryggja, at okkara egna tilfeingi eisini kom arbeiðsplássum á landi til góðar umframt at verða troytt til matna. Tað skuldi tó vísa seg, at virkið hevði so nógvar byrjunartrupulleikar, at tað ongantíð kom fyri seg. Ta søguna kenna vit øll.

Nú bendir so okkurt á, at henda góða ætlan aftur er við at gerast veruleiki, og tað kunnu vit bara taka fult undir við.

Enn ein fiskavirkisætlan á landi tykist eisini at hava viðvind. Tað er einki mætari enn flaggskipið í fiskivinnumiðdepli føroyinga, Kósavirkið í Klaksvík, sum stendur til at lata dyrnar upp aftur. Tað var ein sonn vanlukka, tá hetta stásiliga virkið lat aftur fyri einum ári síðani. Nú tykjast loksins vera kreftir, sum fáa endarnar at røkka saman aftur, og hetta gleðast vit øll um.

So, tá so nógv verður tosað um kreppu í hesi tíð, eiga vit so sanniliga ikki at gloyma ljósglottarnar, sum eru mangir. Og hesir báðir, vit her hava nevnt, eiga so sanniliga ikki at undirmetast. Vit ynskja pelagiska virkinum í Kollafirði og Kósavirkinum í Klaksvík vælkomnum aftur í vinnuskaran og góða eydnu.

**Sosialurin**

## Nú tað fjarar í lands- og kommunukassunum

**JÓGVAN VIÐ KELDU**



Einki nýtt er í, at tað hava verið framherjar á landspolitiska stríðsvøllinum, sum hava lagt dent á at fjálga um landskassan, at leggja fleiri byrðar á kommunur og vinnulív.

Eisini at taka burtur avtalaðar og lóggivnar stuðulsskipanir í tíggjutals milliónaklassanum, og lóggeva henda stuðul aftur í landskassan í staðin.

Uttanumtosið hjá okkara floksformonnum vísir, at nú trupult er at fáa endarnar at røkka saman, hava teir ilt við at taka neyðug stig.

Tórshavnar kommuna fegnast í hvørjum taki, tá løgtingið lóggevur fleiri byrðar á kommunur, tí hvussu út sær, endar pengingur í ávísum relativt høgum prosentparti óbeinleiðis aftur í kommunukassanum har. Her er, so segði íslendingurin, »gaman at liva«!

**Norðoya tingfólk tigandi í debattini**

Tingfólkini í Norðoyggjum eru sum farin undir heilt í debattini ella orðaskiftinum. Tað er harmiligt, tí orðaskifti í fjølmiðlunum er oftast við til at tilevna og búna mál til avgreiðslu. Onnur tingfólk hava langt síðani sæð hetta. - Tað tykist undarligt, at tingfólkini í Norðoyggjum eru so tigandi í debattini, tá tað snýr seg um egið øki.

Sjarmørurin Edmund Joensen fer ótarnaður fram sína sigursgongd á sentralistisku leiðini saman við tigandi tingfólkum úti um landið.

Kanska tey ressast, tá stríð tekur seg upp, tá okkurt hissini uppskot kemur um at leggja stovn úti um landið, tí »har skal hann ikki liggja«!

Tann ið trýr, at Føropyar fáa dynamiskan gerandisdag av hesum, fer skeivur. Nú verða skaptir fleiri almennir stovnar at ansa eftir hinum stovnunum, sum aftur gerast eftiransingarstovnar eftir eftiransingarstovnum. – Okkara lítlu Føroyar er eitt spennandi bureaukratiskt samfelag.

Nú tað fjarar í lands- og kommunukassunum má tíverri staðfestast, at lóggivið verða fleiri og tyngri byrðar á kommunur og vinnulív.

## Detailstýring ella viðurkenning, Jóannes?

**BERGTÓRA HØGNADÓTTIR JOENSEN**



Landsgranskoðanin hevur fleiri ferð víst á, at reglur í mun til starvsfólkarøkt og starvsfólkamenning høvdu verið skilagóðar. Hoyri í tíðindunum í kvøld fíggjarmálaráðharran svara aftur, at tað vildi verið óneyðug detailstýring at komi við slíkum reglum.

**Er tað nú so?**

Minnist, at nøkur stavsfólk á sjúkhúsinum fyri góðum ári síðani vóru á fakligari ráðstevnu uttanlands. Fingu væl burturúr, men fleiri tinglimir hartaðu tey ament í bløðunum. Sagt var, at tað var løgið at nýta pening til slíkt, sum tíðirnar vóru.

Samstundis hoyri eg javnan politikarar sáa iva um, um hetta við orku til starvsfólkaøkið og starvsfólkatrivna veruliga er neyðugt. Orka til starvsfólkaøkið verður sjáldan raðfest – fíggjarætlanirnar hjá almennu arbeiðsplássunum eru oftast trongar, og trivnaður og menning verður við sviðusoð júst av teirri orsøk. Skeið, supervisjón, upplæring er hjá mongum óhoyrt. Hetta, hóast kanningar hava víst, at fólk sum trívast:

*støðast betri*
*hava færri sjúkradagar*
*eru effektivari*
*gera færri villur*

**Ger reglur**

Júst tí haldi eg, at tað hevði verið kærkomið um fíggjarmálaráðharrin kom við nøkrum reglum í mun til starvsfólkarøkt og menning. Á hendan hátt kundi hann víst á, at hann helt tað vera týdningarmikið at raðfest økið.

Eftir allar flongjurnar til almenna arbeiðsmarknaðin frá samgonguni, eftir at almenni arbeiðsmarknaðurin 'loyvdi' sær at taka av avtalaðu lønarhækkingini, hevði tað verið kærkomið við einari viðurkenning um, at tað er í lagi at raðfesta starvsfólkatrivna og menning.

## Hvørja lóg brýtur Intrum?

**JÁKUP BECH JENSEN**
stjóri, Intrum Føroyar



Georg Petersen, blaðmaður á Dimmalætting, skrivar í grein í Dimmalætting 10. november 2009, at Intrum Justitia virkar í lógloysi.

Hinvegin skrivar hann eisini í sama andadrátti at enda í greinini, at í Føroyum er í gildi ein lóg frá 1988 um inkassso- og detektivvirksemi.

Hesin óvanligi mátin at bera fram tíðindi sigur í grundini alt um trúvirðið í hesi blaðgrein.

Georg eigur at vita, at tað, sum ikki er bannað við lóg ella krevur góðkenning sambært lóg, er lógligt.

Virksemið hjá Intrum Justitia í Føroyum er ikki í stríð við nakra lóg og krevur ikki góðkenning sambært lóg. Georg ger sjálvur í geinini vart við, at lógin um inkassovirksemi júst ásetir, at Intrum ikki kann geva seg út fyri at virka sambært løggilding.

Vit spyrja nú, hvørja lóg brýtur Intrum? Georg, vit ganga út frá, at tú antin vísir á hesa lógargrein í komandi útgávu av Dimmalætting ella fara vit víðari við hesum máli.

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller
jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
**Marknaðarleiðari:** Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Høgni Thomsen hogni@sosialurin.fo
Elin Vatnhamar Olsen evo@sosialurin.fo
Svein Rógvi Nielsen Ljósstein sveinrogvi@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Inna Törnroos inna@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Leo Poulsen leo@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Árni Joensen arni@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Rógvi Nybo rogvi@sosialurin.fo
Eirikur í Jákupsstovu eij@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Alvin Elleby Andersen alvin@ras2.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 frá kl. 8.00-20.00 og boða frá

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 13[30]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.